## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og regn av og á. Eisini mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri og fyrrapartin yvirhøvur turt, men seinnapartin regn. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Høgni skrivar Norrønt



*Høgni Djurhuus, nýggi skrivari Norrøna Felagsins í Føroyum*

**Norrøna Felagið í Føroyum hevur sett Høgna Djurhuus í starv sum skrivara felagsins. Høgni er 50 ára gamal og starvast dagliga á tíðindadeildini í Útvarpi Føroya.**

– Nýggi skrivarin hevur fleiri royndir í norrønum samstarvi. Í fleiri ár var hann við í Nordisk Journalistforbund og nú er hann virkin í samskipanini Nordfag, skrivar felagið í tíðindaskrivi.

Herheima hevur Høgni verið við í grunninum Fjølrit og tá fyrsta og higartil einasta filmsstevna við altjóða broddi varð fyriskipað í Norðurlandahúsinum í 1989, var Høgni samskipari. Fyri hetta avrik fekk hann umtalu í heimsins største filmblaði »Variety«.

Norrøna Felagið skipar fyri regluligum limafundum, har mál av almennum norrønum áhuga verða viðgjørd. Næsti fundur felagsins verður í Listaskálanum hin 14. november, tá Mikkjal Helmsdal sjónvarpsstjóri fer at greiða frá um Áland, har hann var í starvi sum stjóri í Nordens Institut.

Hin 19. november verður Norrøna Felagið í Føryum 50 ár. Hetta verður hátíðarhildið leygardagin hin 17. november. Klokkan 18 henda dag letur framsýning upp á Landsbókasavninum, har brævaskiftið hjá Heðini Brú, sum elvdi til stovnanina í 1951, verður sýnt fram. Um kvøldið, klokkan 19:30 verður fimmti ára veitsla í Müllers Pakkhúsi. Við hetta høvi fer Høgni Hoydal, sum er landsstýrismaður í norðurlandamálum, at halda røðu.

Hin 13. desember skipar felagið fyri jólahugna í Listaskálanum. Eftir ársskiftið verða limafundir felagsins í Norðurlandahúsinum.

Høgni er kendur í norðurlendskum samstarvi.

## Arbeiði fyri mannarættindum

Aðalfundurin hjá Amnesty International, sum var í Senegal í august, samtykti at broyta statuttirnar ella lógina fyri felagsskapin grundleggjandi. Í framtíðini skal Amnesty arbeiða við øllum mannarættindaspurningum, og ikki longur avmarka seg til einstakar spurningar, soleiðis sum støðan hevur verið, síðani Amnesty varð sett á stovn.

Nýggi aðalskrivarin Irene Khan segði um broytingarnar:

»Amnesty International er, eins og tað altíð hevur verið, ein rørsla, sum stríðist fyri einstaklingum, hvørs mannarættindi eru brotin. Munurin er, at vit nú ikki eru avmarkaði til at arbeiða til frama fyri samvitskufangum og ímóti torturi. Nú kunnu vit arbeiða ímóti allari diskriminatión, bæði tá hendan ávirkar politisku og borgaraligu mannarættindini, og tá hon ávirkar búskaparligu, sosialu og mentanarligu rættindini.«

»Vit verða før fyri at arbeiða effektivari, og við størri atliti til mannarættindastøðuna í 21. øld. Við at arbeiða fyri at øll menniskju skulu hava gagn av øllum mannarættindunum, ber nú til hjá Amnesty International at fara til verka á nýggjum økjum, sum t.d. at arbeiða fyri rættindunum til útbúgving og til eina góða heilsu.«

**Limafundur**
Í sambandi við broytingarnar í statuttunum skipar Amnesty International Føroya Deild fyri limafundi um víðkaðu arbeiðsuppgávurnar hjá felagnum. Umboðini úr Føroya Deild, sum luttóku á altjóða aðalfundinum (ICM), fara at greiða frá broytingunum, og hvat tær merkja fyri okkara deild. Fundurin verður á Føroyamálsdeildini, V. U. Hammershaimbs gøtu 16, mikukvøldið 24. sept. kl. 19.30. Øll eru vælkomin.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 18 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 12 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 13 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 9 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 9 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 21 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 26 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 25 |
| New York | 14 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 964 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga suðureftir og grynnist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar komandi samdøgur.




Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi grynnist og hátrýstið við Vestur-Noreg stendur mestsum í stað.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/10 kl. 06⁰⁰– 18/10 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 17/10 kl. 06⁰⁰– 18/10 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í oktober: 93,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

14. okt.: Mánin næstur jørðini
16. okt.: Tendring
24. okt.: Fyrra kvarter
26. okt.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 19. okt | 09.18 | 21.44 | 08.18 | 20.44 | 08.33 | 20.59 | 11.18 | 23.44 | — | 12.18 | 07.33 | 19.59 | 06.33 | 18.59 | 09.33 | 21.59 | 10.33 | 22.59 | 09.03 | 21.29 | 10.18 | 22.44 |
| 20. okt | 10.09 | 22.35 | 09.09 | 21.35 | 09.24 | 21.50 | — | 12.09 | 00.44 | 13.09 | 08.24 | 20.50 | 07.24 | 19.50 | 10.24 | 22.50 | 11.24 | 23.50 | 09.54 | 22.20 | 11.09 | 23.35 |
| 21. okt | 11.01 | 23.27 | 10.01 | 22.27 | 10.16 | 22.42 | 00.35 | 13.01 | 01.35 | 14.01 | 09.16 | 21.42 | 08.16 | 20.42 | 11.16 | 23.42 | — | 12.16 | 10.46 | 23.12 | — | 12.01 |
| 22. okt | 11.52 | — | 10.52 | 23.18 | 11.07 | 23.33 | 01.27 | 13.52 | 02.27 | 14.52 | 10.07 | 22.33 | 09.07 | 21.33 | — | 12.07 | 00.42 | 13.07 | 11.37 | — | 00.27 | 12.52 |